

NORÐURLANDAHÚSIÐ **TILTØK APRÍL 2004**

**SKRÁIN VIKA 27–28**

**Framsýningin "Veiðimentan" er á Etnografisk Museum í Stockholm til 23. september 2004.**

**Framsýningin "Atlantic Visioner" (F) í Mikkelberg, Suðurslesvig endar 04. juli 2004.**

**Summarframsýningin 2004, við átta føroyskum listafólkum, er í húsinum til 30. juli 2004.**

**Mikudagur 7. juli**

**Kl. 19.30** **Summartónar 2004**, konsert Atli Ellendersen, violin (FO) og Sune Brogaard , klaver (DK). Skráin sæst á www.nlh.fo Atgongumerki á kr. 80.-. eru at fáa í NLH og Kunningarstovuni í Havn.

**Norðurlandahúsið er opið gerandisdagar kl. 10.00-18.00 og sunnudagar kl. 14.00-18.00**

**NORÐURLANDAHÚSIÐ Í FØROYUM**
**Telefon nr. 317900 · Telefax nr. 319790**
**www.nlh.fo · e-mail: nlh@nlh.fo**


2 Nr. 209 - 31. oktober 2000




Kennir tú London ?

*Vinnarin í seinastu viku:*
**Robert Poulsen**
**Skraddaragøta 16**
**188 Hoyvík**

Sosialurin

ATLANTIC AIRWAYS

FØROYAPRENT · TEL. 314 555



STARVSLÝSING

## Verkfrøðingur

**Søkt verður eftir verkfrøðingi e.l. til havnadeildina. Havnadeildin hevur ábyrgdina av málum viðvíkjandi havnum og lendingum, fysiskari planlegging á sjónum, geofysiskum, hydrografiskum og meteorologiskum mátingum og øðrum.**

**Arbeiðsuppgávur**
Uppgávur, sum viðkomandi í høvuðsheitum kann rokna við at skula røkja, fevna eitt nú um:
- hald og rakstur av havnum og lendingum
- fakeftirlit við verkætlanum
- eftirlit við vitum
- mátingar og kanningar

**Førleikakrøv**
Sóknast verður eftir verkfrøðingi ella fólki við líknandi tekniskari útbúgving – helst við royndum innan nøkur av omanfyri nevndu virkisøkjum. Harafturat kundu vit hugsað okkum, at umsøkjarin hevur góðan edv-kunnleika.

Umsøkjarin skal hava góð samstarvsevni, skal duga at skipa sítt arbeiðsøki og kann geva sítt íkast til menning av arbeiðsplássinum og vera førur fyri at arbeiða sjálvstøðugt.

**Setanarviðurskifti**
Løn og setanartreytir annars verða sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

**Umsóknir**
Umsóknir við prógvum, møguligum ummælum og lívsgongdarlýsing (cv) verða at senda til:

Landsverk
Postsmoga 78
FO 110 Tórshavn

og skulu verða skrivstovuni í hendi í seinasta lagi 15. juli 2004. Brævbjálvin eigur at merkjast "Verkfrøðingur e.l. til havnadeildina". Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast frá Ewaldi Kjølbro á tel. 311 333, lokal 316, e-postur: ek@lv.fo ella fartel. 540 861

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn, | Tel 311 333, Faks 314 986, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK *byggir land*

www.sansir.fo


### Doulos
**Í Klaksvík 1.-4. juli**
**Fríggjadagin kl. 19.30**
**Serligt kvøld fyri hjún.**
Tørvar tykkum eitt fríkorter? Verið vælkomin umborð á Doulos at njóta eitt friðsælt kvøld við døgverða, góðum tónleiki og undirhaldi. Av tí at plássið er avmarkað er neyðugt at ringja og bíleggja pláss frammanundan. Bílegging á tlf. 585841 (á enskum) og 585840 (á føroyskum).
**Leygardagin kl. 21 Altjóða kvøld**
Upplivið tær mongu framvísingarnar og tey mongu ljóðini frá ymiskum mentanum kring heimin, sum verður framført við tónleiki, leiki, sangi og dansi, meðan vit saman luta Guds kall til okkara um at vera eitt ljós fyri øllum heimsins tjóðum. Hetta er eitt kvøld fyri alla familjuna og **tiltakið verður í KÍ-høllini í Klaksvík**. Høvi verður at geva eina gávu til tiltakið.
**Dúgvan siglur eykatúr av Klaksvík kl. 24.00.**
*Opið er umborð fyri almenninginum mán.-leyg. kl. 10-22 og sunnudag kl. 14-22.*

### Hebron, Argir
Sunnudagin kl. 10.30 Morgunmøti og samstundis verður barnaansing. Á møtinum talar Súni S. Jaocbsen.
www.hebron.fo

### Kirkju- og missiónshúsið á Argjum
Sunnudagin kl. 19 Møti v/ Albin Johannesen, Klaksvík.

### Samkoman Rhema
Sunnudagin kl. 11 Møti.
www.rhema.fo

### Katólska Kirkjan
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Orðsins tænasta v/ kommunión í Kerit.
Leygardag kl. 11.30 Messa í Kerit.
Sunnudag kl. 11 Hámessa v/ Benny Blumensaat prest, í Mariukirkjuni. Aftaná verður kirkjukaffi.
Mánakvøldið 5. juli kl. 19.30 verður Marie Keevern frá Missiónsskipinum »Anastasis« í Mariukirkjuni. Hon fer at siga frá, um arbeiðið og uppgávurnar umborð á hospitalskipinum, »Anastasis« ið verður á Havnini tann 7.-15. juli 2004. Øll eru vælkomin.

### Meinigheitshúsið
Sunnudagin kl. 18 Møti v/ Øssur Kjærbo, Niels Juul og Birgit syngja.

### Tórshavnar Hvítusunnusamkoma
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti og kl. 18.00: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

### Meinigheitin í Hoyvík
*uppi á Brekku 3*
Leygarkvøldið kl. 22 Bøn fyri býnum.
Sunnudagin kl. 11 Gudstænasta v/ Jóhan P. Johannesen. Evnið: Fráhald, sunnudagsskúlin er farin í summarfrí.
Útimøti á Vaglinum kl. 22 – um viðrar.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarmøti.
Mikumorgun kl. 7 Bønarmøti.



FILMSTEIGURIN

# 13 skjótt 30

Árið er 1987, og tann 13 ára gamla Jenna stendur á gáttini til at gerast kvinna. Men menningin gongur – sambært henn sjálvari – ikki nóg skjótt.

Hon er plágað av sínum irriterandi foreldrum, tey smørtu í skúlanum leggja ikki merki til hana, og tann vakri drongurin, sum hon er skotin í, veit illa nokk, hvussu hon eitur. Tann einast, ið tímir at brúka tíð saman við henni, er grannin Matt Flamhaff.

Jenna ger tí av at gera nakað við ólukkuligu støðu sína. Hon skipar fyri eini stórari føðingardagsveitslu og bjóðar øllum teimum smørtu frá skúlanum við. Til hennara yvirraskilsi koma øll – men Jenna sjálv verður eyðmýkt upp á tað grovasta og læst inni í einum skápi.





Einsamøll í sápsins myrkri ynski Jenna innarliga, at hon verður vaksin og fær tað lív, sum hon altíð hevur droymt um – og ótrúligt nokk gongur ynskið út!

Tá hon traðkar út úr skápinum næsta morgun, er árið 2004, og hon er nú ein vøkur 30 ára gomul kvinna við góðum starvi sum mótablaðstjóri og eini lekrari íbúð á Manhattan. Nú er tað hon, sum er tann tjekkaða!

Einasti trupulleikin er, at hon ikki ánar, hvussu ho er enda í hesi støðuni.

Jenna kemur skjótt yvir tað, men finnur út av, at ein týðandi persónur vantar í lívi hennara – Matt.

Hon finnir fram til hansara fyri at endurbyggja vinarlagið, men Matt er trúlovaður og skal skjótt giftast. Spakuliga gongur upp fyri Jennu, at hennara inniliga ynski ikki var tað besta kortini. Kanska kundi alt blivið gott aftur, um hon bara fekk enn ein møguleika…





**Frumsýning**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Fríggjadagin | 02.07. | kl. $21^{15}$ | Fríggjadagin | 02.07. | kl. $23^{30}$ |
| Leygardagin | 03.07. | kl. $21^{15}$ | Leygardagin | 03.07. | kl. $23^{30}$ |
| Sunnudagin | 04.07. | kl. $20^{15}$ | Sunnudagin | 04.07. | kl. $22^{30}$ |

**Stórt úrval av DVD-filmum til sølu**

**HAVNAR BIO**
P Tlf. 31 19 56 P
www.bio.fo




| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Fríggjadagin | 02.07. | kl. $20^{30}$ | Fríggjadagin | 02.07. | kl. $23^{00}$ |
| Leygardagin | 03.07. | kl. $20^{30}$ | Leygardagin | 03.07. | kl. $23^{00}$ |
| Sunnudagin | 04.07. | kl. $19^{30}$ | Sunnudagin | 04.07. | kl. $22^{00}$ |




**Billettprísur: 70,- kr.**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Fríggjadagin | 02.07. | kl. $18^{00}$ | Leygardagin | 03.07. | kl. $18^{00}$ |
| Sunnudagin | 04.07. | kl. $17^{00}$ | | | |

**KOMANDI FILMUR**




**Frumsýning**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Týsdagin | 06.07. | kl. $24^{00}$ | | | |
| Mikudagin | 07.07. | kl. $19^{30}$ | Mikudagin | 07.07. | kl. $22^{15}$ |

P **BIO KIOSKIN** P
**Heitt Pop-Corn - Coca Cola - Góðgæti - Fóm ís - o.m.a.**